Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Henrik Old, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Gjaldið frá Strandferðsluni til Tórshavnar havn

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvat Strandferðslan rindar í leigu fyri parkeringsøkið á Bursatanga?
2. Hvat kostar tað hjá Strandferðsluni at leiga tornið til at ganga umborð á Smyril?
3. Hvat kostar tað hjá Strandferðsluni at leiga pakkhús og skrivstovu á kaiini?
4. Hvussu nógv rindar Strandferðslan í havnargjaldi fyri Smyril til Tórshavnar havn?
5. Hvat er gjaldið hjá Strandferðsluni fyri ferðafólk og bilar, sum fara umborð á Smyril umframt samlaða gjaldið fyri 2021?
6. Hvussu nógv rindar Strandferðslan fyri bingjur og last fyri virksemið á Bursatanga?
7. Hvat er sostatt samlaða gjaldið hjá Strandferðsluni til Tórshavnar havn?

Viðmerkingar:
Tjóðleikhúsið skal eftir ætlan byggjast á Bursatanga. Men á leið 265.000 ferðafólk og 111.000 bilar eru farnir við Smyrli um kaikantin á Bursatanga í 2021. Hetta merkir, at stórir kostnaðir hjá Strandferðsluni eru knýttir aftrat virkseminum hjá Smyrli.

Haraftrat kann nevnast, at í Nólsoy eru 87.000 ferðafólk og 5.500 bilar farin um kaikantin, og eisini her eru stórir kostnaðir knýttir aftrat.

Eisini byrjar farleiðin til flogvøllin og til Klaksvíkar á Bursatanga. Tað vóru 55.000 ferðafólk frá Bursatanga til flogvøllin í 2021. Sama ár vóru 75.000 ferðafólk úr Tórshavn til Klaksvíkar; so sigast má, at hetta má vera eitt tað mest ferðslutunga økið, sum er í landinum.

Tað er umráðandi, at kostnaðurin fyri nýtsluna á Bursatanga verður upplýstur, nú eitt tjóðleikhús eftir ætlan skal staðsetast sama stað.

Á Løgtingi, 9. september 2022

Henrik Old